†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at kæri bróðir okkara

**Carl Trygvi Jensen**
Sandur

andaðist á Landssjúkrahúsinum 23. januar,
77 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sands kirkju
sunnudagin 26. januar kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Minni og Halgir**

Tey, ið vilja minnast Trygva kunnu lata eina peningagávu til Áargarð, konto í peningastovnunum.

†

Jarðarferðin hjá

**Páll Poulsen**
Syðrugøta

verður úr Gøtu kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Margith, Andreas og Conny**

Tey, ið vilja minnast Páll kunnu lata eina peningagávu til Diabetesfelag Føroya, konto í peningastovnunum.

# Hjálpa børnum, ið missa foreldur við deyða

**Anna S. Dalsgaard og Jóngerð Poulsen skipa hóskvøldið fyri fundi, ætlaður børnum, ið mist hava foreldur við deyða**

SAKNUR
*Eirikur Lindenskov*



*Anna S. Dalsgaard fer saman við Jóngerð Poulsen at skipa fyri fundi ætlaður børnum, ið hava mist foreldur við deyða*

Hóskvøldið kl 19 hava Anna S. Dalsgaard, lærari, og Jóngerð Poulsen, heilsusystir, kunnandi fund í Eysturskúlanum í Havn. Fundurin er ætlaður børnum, sum hava mist foreldur við deyða og avvarðandi teirra, og er um stovnan av sjálvhjálparbólki ella bólkum. Aldurin hugsað verður um, er frá 2. flokki til umleið 17 ár.

Í dagliga arbeiðið sínum koma Anna S. Dalsgaard og Jóngerð Poulsen javnan í samband við børn, sum hava mist foreldur við deyða. Tað veri seg við sjúku ella av vanlukku, á landi ella á sjógvi.

– Vit hava mangan ynskt at hava møguleika at vísa hesum børnum til onkra hjálp, siga tær báðar.

Hetta hevur víst seg at vera sera trupult, og hava tær tí sjálvar gjørt av at fara undir eina verkætlan, ið tær kalla »Sjálvhjálparbólkur fyri børn, sum hava mist foreldur við deyða«.

Í løtuni er einki tilboð av hesum slag í Føroyum, og royndir aðrastaðni, eitt nú í Danmark, hava víst, at hetta er ein sera góður máti at fáa arbeitt við sorgini. Familjan er hart rakt og er í sorg, tó at sorgin er ymisk alt eftir, hvørja relatión persónurin hevði til tann deyða.

– Hetta er sera kensluborið og barnið lærur skjótt at sýna fyrilit til hini avvarðandi. Hetta førir ofta við sær, at barnið ongan hevur at tosa við um sínar innastu kenslur, siga tær báðar.

– Vinfólk eru góð og kunnu geva góðan stuðul, men um tey ikki hava roynt at standa í somu støðu, er torført, fyri ikki at siga ógjørligt, hjá teimum at seta seg inn í kenslurnar hjá barninum, ið hevur mist. Børnini kenna seg sera einsamøll, siga Anna S. Dalsgaard og Jóngerð Poulsen.

Ein sjálvhjálparbólkur kann lætta um. Børnini hava øll mist foreldur og kenna sorgina á egnum kroppi. Í bólkinum sleppa tey t. d. undan at rættvísgera, at tey framvegis eru kedd, sorgarbundin, ill, tíma ikki at rokna, orka ikki sínar vinir beint nú o.s.fr. tí, hini vita hví, og kenna tað kanska partvís soleiðis sjálvi. Børnini kunnu tosa um ræðsluna fyri at hitt foreldrið eisini doyr, tí tann óttan hava flest øll, sum hava mist. Hetta kann vera sera torført at tosa við tann eftirsitandi um. Allar hesar kenslur sleppa tí kanska at sita har sum ein knútur, sum forðar barninum í at liva eitt »barnalív« aftur.

Anna og Jóngerð siga, at fólk annars sjálvi skulu gera av, hvussu hendan tilgongdin annars skal verða. Tær eru at hittaa á telefon: Jóngerð 316419/227074. Anna 319552.


Vetrarferðatilboð
14.09.2002 - 10.05.2003
The North Atlantic Link

Danland
2 vaksin og 2 børn við bili
galdandi fyri 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er:
Ferðin aftur og fram við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum.
Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals
4.995,-
gisting 7 nætur

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.

Langt vikuskifti
Shetland Cruise
hósdag til mánadag

Shetland Cruise

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |

Shetland

Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
fyri hvønn 3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-

e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00


Fýra fingu gullnál:

# Hava latið 25 litrar av blóði

**Hósdagin fingu fýra blóðgevarar eina gullnál fyri at hava latið blóð 50 ferðir í part. Men á blóðbankanum vantar teimum altíð gevarar, og heita tey tí á fólk um at melda seg sum gevarar**

BLÓÐBANKIN
*Ingrid Bjarnastein*



*Marita Guttesen, Julian Eliasen, Steingrím Vang og Gunnrið Jóanesarson fingu hósdagin eina gullnál fyri at hava latið blóð 50 ferðir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá tú ert blóðgevi fært tú eina nál viðhvørt, alt eftir, hvussu ofta tú hevur latið blóð. Fyrstu ferð tú letur blóð fært tú eina nál við einum blóðdropa. 10. ferð fært tú ein blóðdropa við bronsuringi rundanum. 25. ferð fært tú við einum silvurringi og 50. ferð fært tú við einum gullringi. Og tá tú hevur latið blóð 100 ferðir fært tú eina pelikan úr kongaligum porsileni.

– At lata blóð er frívilligt, og tú gert tað ókeypis. Hetta er bara ein súmbolsk gáva, sum verður latin blóðgevunum fyri at hava bjargað nógvum mannalívum, sigur Marita Simonsen, sum arbeiðir á laboratoriinum á Landssjúkrahúsinum og er forkvinna í Felagið Blóðgevi í Havn.

Hagtølini fyri 2002 siga, at í blóðbankanum hava tey tappað 1600 gevarar í fjør. Men tørvurin á meira gevarum er altíð til staðar.

– Vit plaga at keypa úr Danmark, men tað er ógvuliga dýrt. Vit mangla altíð gevarar, tí tað eru so nógv fráfall. Her í Havn hava vit 1100 gevarar, men tað er verri enn so ikki eitt reelt tal, tí tað eru so nógv fyrivarni at taka. Onkur er við barn, onkur tekur pensilin, onkur lesur uttanlands, onkur annar siglir úti og so framvegis, so vit fáa verri enn so ikki brúkt allar, greiðir Marita Simonsen frá.

## Krøv

Krøvini fyri at gerast blóðgevi er, at tú ert millum 18-60 ár og vigar meira enn 60 kilo. Harafturat skalt tú eisini verða frískur á allar mátar. Um tú ynskir at geva blóð verða blóðroyndir tiknar fyri at tryggja, at alt er í lagi.

– Nýtslan av blóði í Føroyum er vorðin størri og størri. Hetta kemst av, at vit hava meira viðgerðir í Føroyum nú enn fyrr. Tað eru nógvir krabbameinssjúklingar, sum krevja blóð, sum fyrr vórðu sendir til Danmarkar, men nú verða viðgjørdir í Føroyum.

Tá ein blóðgevi letur blóð, verður umleið ein hálvur litur tappaður. Blóðið verður sentrifugerað, og verður nýtt til trý ymisk endamál aftaná, so við at geva blóð fært tú hjálpt trimum ymsum sjúklingum.

Hósdagin fingu so fýra blóðgevarar eina gullnál. Teir hava tilsamans latið 25 av blóði í part.

# Rafik er komin til Havnar

**Rafik´sa Pizza og shawarma er heitið á nýggjum matstaði í hjartanum í Havnini**

MATSTAÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Í seinastu viku lat upp enn ein nýggj matstova í Havnini. Talan er um eitt pizzeria/shawarma grill, sum liggur har, Casablanca áður hevur hildið til.

Rafik Bourbiaa eigur nýggja matstaðið, sum eitur Rafik´sa pizza og shawarma. Rafik er úr Tunesia, men hevur búð í Føroyum, Vestmanna, í fleiri ár nú.

Fyri nøkrum árum síðani lat Rafik upp pizza og shawarma grill inni á Høgabóli í Saltangará, og nú er Rafik eisini komin til Havnar.

Hjá Rafik kanst tú fáa pizz a og shawarma, umframt ymiskt annað gott.



*Talel, sum er systirsonur Rafik, er eisini úr Tunesia , ger her pizza í nýggja pizza og shawarma matstaðinum í Havn, sum eitur Rafik´sa pizza og shawarma*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


Skíferð til Noregs
Gaustablikk í Telemarken frá 3.-10. mars

4 vaksin og 4 børn
Íroknað flogferð og innivist
Vaksin, fyri hvønn kr. 4780,-
Børn, fyri hvønn kr. 2960,-

Íbúð 2 vaksin og 2 børn
Íroknað flogferð og innivist
Vaksin, fyri hvønn kr. 4780,-
Børn, fyri hvønn kr. 2575,-

Hotel Gaustablikk
á dupultrúmi v/hellpensión
Fyri hvønn kr. 8480,-

Liftkort: 6 dagar
Vaksin kr. 1000,-
Børn 8-15 ár kr. 850,-
Børn 0-7 ár frítt

www.ff.fo
ella ring til: 34 00 00

FLOGFELAG FØROYA
www.flogfelag.fo